[redacted]

# Familjudagur hjá Reyni Service

Leygardagin var ein sonevndur familjudagur hjá Reyni Service, har skipað var fyri ymiskum tiltøkum fyri alla familjuna og kanska serliga børnini.

Har vóru t.d. hoppiborgir og pylsuvognur, eins og teknikapping og skattajakt.

Meðan børnini hugnaðu sær, nýttu foreldrini høvið til at hyggja eftir bilum og royndarkoyra nýggju Toyota bilarnar sum t.d. Yaris, Auris og Verso.

Nógv fólk vitjaðu Reyni Service hendan dagin og familjurnar hugnaðu sær, sigur Sámal av Reyni sølustjóri hjá Reyni Service.

*Myndir: Heðin Weihe*



*Familjudagurin varð hildin í besta summarveðri*









*Ebretti el-skutarin líkist teimum kendu italsku Vespa*

# El-drivin skutari

Alsamt fleiri el-drivin akfør koma á marknaðin í hesum døgum. Nú koma hollendsku Ebretti skutararnir við elmotori á danska marknaðin.

Hesir skutarar kunnu koyra við eini ferð upp á 45 km/t og koyra 50 km upp á eina løðing.

Ebretti skutararnir eru designaðir í retro-stíli og líkjast teimum kendu italsku Vespa.



*Í sambandi við 25 ára hátíðarhaldið eru framsýningar av nógvum VW-bilunum gjøgnum tíðirnar*




# Volkswagen Automuseum í Wolfsburg 25 ár



Volkswagen Automuseum í Wolfsburg í Týsklandi kundi herfyri hátíðarhalda at 25 ár vóru liðin síðan savnið varð tikið í nýtslu tann 25. april 1985.

Í sambandi við 25 ára hátíðarhaldið eru nógvar ymiskar framsýningar av VW-bilunum gjøgnum tíðirnar.

Volkswagen Automuseum er eitt av mest vitjaðu søvnum í Týsklandi. Í Wolfsburg er eisini Volkswagen býurin Autostadt, sum saman við Disneyland, uttan fyri Paris, verður roknað sum eitt av stóru ferðafólkamálunum í Evropa.

Býurin Wolfsburg er bygdur upp rundan VW-bilverksmiðjuna, har umleið 50.000 fólk arbeiða.